# Fortreytirnar fyri búskaparpolitikki í tilfeingisríkum pinkulandi

## Hevur altjóða kappingarføri týdning ?

Hermann Oskarsson*

March 18, 2021

**Samantøka**

Serliga trý eyðkenni við føroyska búskapinum gera mun á Føroyum og flestu londum. Í fyrsta lagi er veruleikin at Føroyar eru pinkuland. Í øðrum lagi er tað sannroyndin at stoytirnir á búskapin koma uttaneftir. Í triðja lagi fær búskapurin á hvørjum ári lutfallsliga stórar gjaldoyragávur burtur úr náttúruríkidømi og einvegis veitingum uttaneftir. Búskaparfrøði skal sjálvsagt lagast til staðbundna høpið, ikki minst tá greiningarnar skulu brúkast til leiðbeinbeining um politisk átøk. At laga almennu búskaparfrøðina til hesi serligu viðurskifti hevur tær avleiðingar, at fíggjarpolitisk tilmæli, sum høvdu verið bein í størri ídnaðarlondum, í mongum førum ikki eru tey beinu í tilfeingisríka pinkulandinum. Eitt nú eru ráðini um at stíla fíggjarpolitikkin eftir altjóða kappingarførinum, sjáldan tey røttu í okkara serliga høpi, hóast búskaparfrøðingar í nógv ár hava mælt til júst tey ráðini.

*Hermann.Oskarsson@gmail.com. Verkætlanin varð fíggjað av Landsbanka Føroya. Stóran lut í tankagóðsinum eigur mín kæri vinur og lagsbróðir Jóannes Jacobsen, sáli. Øll sjónarmið eins væl og øll brek og lýti í greiningini og í ritinum eru kortini høvundans.

# Yvirlit


**1 Pinkulítil, kykur og viðbrekin búskapur** **1**

**2 Ivasom hyggjuráð** **3**

**3 Hvussu er búskapurin skrúvaður saman: Bygnaðurin** **5**

3.1 Vinnuhøpi . . . . . . . . . . 5

3.1.1 Gjaldoyraframleiðsla . . . . . . . . . . 6

3.1.2 Heimamarknaður . . . . . . . . . . 9

3.1.3 Fiskaídnaðurin . . . . . . . . . . 9

3.2 Langt og stutt sýni - og tillaging . . . . . . . . . . 11

3.3 Stoytirnir koma uttaneftir . . . . . . . . . . 14

3.4 Tilfeingisrentan í útflutninginum . . . . . . . . . . 15

3.5 Samanhangurin . . . . . . . . . . 17

**4 Tillaging til broytingar** **18**

**5 Úrtøkiligir men hentir myndlar** **19**

**6 Einfaldur ástøðiligur myndil** **19**

**7 Fíggjarpolitikkur og kappingarføri** **22**

7.1 Aftursveiggj - negativur stoytur . . . . . . . . . . 22

7.2 Framsveiggj - positivur stoytur . . . . . . . . . . 25

**8 Inntøkubýtið og makrobúskaparligu avleiðingarnar** **28**

**9 Støðufestigrunnur** **31**

**10 Niðurstøður** **32**

**Heimildir** **34**

**Talvur** **37**

**Myndir** **38**

# 1 Pinkulítil, kykur og viðbrekin búskapur

Føroyski búskapurin er munandi meira kykur enn hann er í flestu grannalondunum. Kortini hevur eydnast heilt væl at fylgja við tí búskaparliga framburði, sum aðrar staðir hevur verið. Í tøkniligum stigi og í institusjónsligum bygnað standa Føroyar ikki so aftarliga í mun til grannalondini. Støddin ger mun, men vegna tess at Føroyar hava megnað rímiliga væl at tikið til sín tann mentanarliga, tøkniliga og politiska arvin úr norðurevropu sum heild og serstakliga úr norðurlondum, eru lívskorini nú ikki minni enn í hinum norðurlondunum.

Føroyar eru fjarskotið pinkuland við øllum teimum eyðkennum, sum harav standast. Fólkatalið er so lítið, at úrvalið av framleiddum vørum og tænastum sjálvsagt verður avmarkað. Mestsum allar ítøkiligar vørur til nýtslu og til íløgur eru framleiddar uttanlands, tí arbeiðsorka og marknaður er ikki til tess innanlands[1]

Fámenta arbeiðsfjøldin skal framleiða allar tær tænasturnar sum neyðugar eru í einum nútímans samfelag og haraftrat framleiða allan útflutningin.




Mynd 1

Hóast pinkusamfeløg hava summar fyrimunir av at vera so fjarskotin, fáment og so lítil í vavi og vídd, eru eisini búskaparligir vansar av tí. Ikki tí, pinkusamfeløg standa seg ikki nógv verri í inntøku og menning enn stóru londini[2]. hóast granskarar eru á ymsum máli um búskaparvøxturin er eins mikil í pinkulondum og aðrar staðir[3]. Er pinkulandið tilfeingisríkt, tykist búskaparvøksturin av teimum ávum eisini at vera minni enn aðrastaðir[4]

[1]Sjá m.a. H. W. Armstrong and Read (2003), H. Armstrong and Read (2002) og Imam (2008)
[2]Sjá Easterly and Kraay (2000)
[3]Sjá Easterly and Kraay (2000), H. Armstrong and Read (2002) and Jansen (2004)
[4]Sjá Krugman (1987), Matsuyama (1992), Sachs and Warner (1995) og Gylfason et al. (1999)

Ein av mest avgerandi vansunum av at vera pinkusamfelag er, at úrvalið av vørum og tænastum ið til ber at framleiða verður so avmarkað. Skal hugsingur vera um at varðveita fólkatalið, má bjóðast framm so frægt úrval av nútímans tænastum, at fólkatalið ikki minkar. Arbeiðsfjøldin sum framleiða skal vørur og tænastur til útflutnings verður tí sera avmarkað.

Sum víst í Mynd 1 verður av hesi orsøk vøruúrvalið í útflutninginum munandi minni enn hjá størri londum, eins og keyparamarknaðirnir verða færri. Myndin vísir HHI vísital (Herfindal-Hirchman Index) av øllum londum í norðurevopa. Tummilsregla sigur at mát millum 0,15 og 0,25 siga frá hampiliga breiðum úrvali, meðan alt oman fyri 0,25 sigur frá lítlum úrvali. Føroyska metið oman fyri 0,6 vísir hvussu serstøk pinkulond eru í hesum høpi.

Pinkulond hava tí ikki tann fyrimun í stabiliteti sum stór lond hava, av tí at sveiggj við breiðum vøruúrvali á nógvum marknaðum mangan javna hvønn annan út. Í Jansen (2004) verður hetta víst at vera alment galdandi fyribrigdi, at pinkulond hava munandi minni úrval av vørum at selja umheiminum, og at vísitalið fyri úrval av útflutningsvørum, "export concentration index", tí er munandi hægri enn hjá øðrum londum.



Mynd 2

Pinkulond hava heldur ikki fyrimunin hjá stórum londum av at framleiðslugrundarlagið er fjøltáttað: stóra útbúna arbeiðsfjøld, kapitali og møguliga breiðum úrval av náttúrutilfeingi. Ikki minni er avmarkingin av lítla heimamarknaðurinum í pinkulondum aftur ímóti stóru londunum. Lítli heimamarknaðurin gevur ikki fyritøkunum stórrakstrarfyrimunir í framleiðslu av vørum og tænastum, og eggjar heldur ikki útlendskum fyritøkum at koma inn á marknaðin at kappast.

Føroyar hava serstakliga fyrimun í handli við vørum, sum grundaðar eru á sjófeingi -

veiddan og aldan fisk. Í fyrra lagi framleiðir pinkusamfelagið fáar vørur, og í øðrum lagi eru tær fáu vørurnar rættuliga lítið viðgjørdar vørur burtur úr náttúrutilfeingi. Sum Mynd 2 vísir skara Føroyar framm úr sum rávøruútflytari í samanburði við øll lond í OECD. Myndin vísir vøruútflutningin av tilfeingisgrundaðum ella rávørugrundaðum vørum í fyrsta flokki í SITC3 navnaskránni um handilsvørur, Standard International Trade Classification, Rev. 3. Árið er 2013 og londini eru øll tey í OECD við hagtølum av hesum slag.

Príssveiggj á útlendskum marknaðum og sveiggj í rávørugrundarlagnum eru tí keldurnar til tey meira kyku lop, sum síggjast í hagtølunum um pinkulond í mun til størri lond [5].

Búskaparliga tilveran er tí meira ófriðarlig í pinkulondum enn í stórum londum. Gongur eftir vild, og rávørugrundarlagið blómar og marknaðarprísirnir eru høgir, verða stór búskaparlig frammsveiggj. Kemur hóttafall á rávørugrundarlagið ella afturstig í fáu keyparamarknaðirnar, verður tilsvarandi ógvusligt aftursveiggj.

## 2 Ivasom hyggjuráð

Búskaparfrøðiligir greiningarstovnar hava ikki so sjáldan gjørt vart við ”ovurhiting” av búskapinum[6], og hava heitt á Landsstýrið um at tátta í búskapin við tálmandi fíggjarpolitikki, tí at kappingarførið[7] var í vanda, tá framsveiggj hevur verið í búskapinum. Við støði í royndum frá størri ídnaðarlondum er mangan hildið uppá, at tá framsveiggj er í búskapinum, og arbeiðsloysið er lítið og einki, kemur trýst á lønirnar, sum síðani kunnu fara so mikið langt upp, at útflutningsvørurnar verða ov dýrar at framleiða. Føroyskar fyritøkur missa tí marknaðir til kappingarneytarnar, og útflutningsframleiðslan minkar. Hetta endar við vinnuloysi og við halli á handilsjavna og gjaldsjavna, so at uttanlandsskuldin vexur.

Við kappingarføri verður mestsum altíð sipað til lønarkappingarføri hjá fyritøkum í útflutningi – altso um lønirnar í styttri skeið vaxa so skjótt, at framleiðslukostnaðirnir hjá

[5] Sjá Jansen (2004), IMF (2013), Cárcamo and Nkurunziza (2020)

[6] Sjá Autrup (2015), Nationalbank (2016), Malthe-Thagaard (2017),Nationalbanken (2018), Malthe-Thagaard and Nagy (2019), Skak-Nielsen (1987) Larsen (1998) og Larsen (1999)

[7] Um búskaparliga greining av kappingarføri sum heild sjá Krugman (1987) og Føroyum viðvíkjandi sjá Búskaparráðið (2001)

fyritøkum fara upp um altjóða galdandi prís. Talan er tí um eitt bráðfeingis fyribrigdi hjá fyritøkum í útflutningi. Hóast tað kann vera meinur trupulleiki, er fyribrigdi vanliga ikki varandi. Sum frá líður boðar hall á gjaldsjavnanum frá, at lønarlagið er ov høgt, og sum frá líður minkar eftirspurnin eftir heimamarknaðarvørum, so at lønarlagið lækkar aftur. Meira verður greitt frá um hetta seinni.

Hóast øll búskaparhagtøl eru meira kyk og variasjónin tí er størri í Føroyum enn í Danmark, so vísa hagtølini seinastu 20 árini ikki nakað rák framm ímóti vinnuloysi og halli á gjaldsjavnanum vegna tess at flakavirkini framleiða minni flak. Hvørki á handilsjavnanum ella á gjaldsjavnanum sæst nakað rák móti vaxandi halli av slíkum ávum. Tvørtur ímóti hevur miðal avlopið á gjaldsjavnanum seinastu stívliga 20 árini verið óvanliga stórt, samanborið við onnur lond.

Hagtølini vísa eisini at miðal árliga arbeiðsloysið síðani 2000 ikki hevur verið meira enn í grannalondunum – heldur minni[8].Ongi hagtøl eru í Føroyum um gongdina í miðal mánaðarlønum ella tímalønum, men tøl úr lønarsáttmálum benda á at lønarvøxturin hevur verið lítil í Føroyum seinastu mongu árini[9].

Hin vegin eru føroysk búskaparsveiggj í stóran mun komin av broyttari nøgd av fiski í fiskiskapi og í aling, og av broytingum í fiskaprísunum í Evropa. Altso eru tað framboðið av fiski og eftirspurningurin eftir fiski uttanlands, sum elva sveiggini í gjaldoyraframleiðslu[10].

*Við einum BTÚ upp á fólkið ájavnt við grannalondini, uttan varandi vinnuloysi, við stórum avlopum á gjaldsjavnanum, lítlari almennari skuld og stórari privatari ogn uttanlands, so líkjast Føroyar ikki einum landi, sum hevur nevniverdar trupulleikar av kappingarførinum hjá útflutningsvinnunum. Lønarvøxturin hevur ikki verið meiri enn í grannalondunum, og*

[8]Miðal árliga arbeiðsloysið hesi árini var 3,3 prosent

[9]Samanburður millum miðallønir í matvøruídnaði í Danmark og arbeiðaralønina í Føroyum vísir, at lønirnar eru vaxnar eitt hálvt prosent meira um árið í Danmark. Sambært tí mann danski vøxturin í produktiuviteti hava verið munandi størri

[10]Í hesum ritinum verður útflutningur nevndur gjaldoyraframleiðsla, vegna tess at fyri føroyingin sum brúkara er útflutningurin fyrst og fremst gjaldoyrainntøka at keypa innflutning fyri. Haraftatumfatar hetta heitið eisini framleiðslur sum kappast við innfluttar vørur og tænastur, sum á enskum kallast *import substitution*

*heldur ikki er matvøruframleiðsla horvin sum ídnaður*[11]*. Tí kann eisini við rímiligari vissu sigast at eitt myndlagrundarlag sum í áratíggju spáar um at kappingarførið er í váða, ikki er haldgott grundarlag at laga greiningar omaná. Spurningurin, sum eftir stendur, er tí hvør búskaparfrøðiligur myndil gevur meira beinrakna greining av gongdini í føroyska búskapinum.*

# 3 Hvussu er búskapurin skrúvaður saman: Bygnaðurin

Eins og frammanundan sagt, er neyðugt at gáa eftir ítøkiligu umstøðunum, tá tú sóknast eftir tí myndlakarmi, sum best lýsir ávísa málsevni í ávísa samfelagnum. Í hesum føri er tikið aftur í aftur ein myndlakarm, sum Búskaparráðið gav út í 2002, og er greiningin her tí nær tengd at myndlinum í Búskaparráðið (2002).

## 3.1 Vinnuhøpi

Tá sagt verður at *"vit liva av fiskivinnuni"* ella *at "vit kunnu ikki liva av at klippa hvørjum øðrum"*, er tað bæði rætt og skeivt. Tá hetta verður sagt, liggur sum grund, at fiskivinnan framleiðir vørur til útflutning, sum vit fáa fremmant gjaldoyra fyri. Tá hugsa fólk sær at virðismiklir pengar renna inn í landið. Pengar, sum seta gongd á annað virksemi. Hjá frisørinum skifta pengar bara hendur millum íbúgvar í landinum. Pengar, sum komu inn í landi frá útflutninginum.

Men handan søgan er ikki røtt. Hon stavar frá tí misskiljing at um ongir pengar vóru, so sótu øll óvirkin og búskapurin helt uppat. Men soleiðis er ikki. Pengarnir seta ikki gongd á nakað sum helst. Tað er eftirspurnin hjá brúkarunum sum setir gongd á framleiðsu og framboð av vørum og tænastum. Pengarnir eru bara smyrslið millum partarnar, sum fær viðskiftini at glíða smidligari.

Søgan er kortini røtt á tann hátt, at útflutningur gevur samfelagnum fyrst og fremst

[11] Í tíðarskeiðinum 1970-2015 minkaði ídnaðarframleiðsla í Danmark sløk tvey prosent sum partur av samlaðu virðisøkingini. Árini 1970-2018 minkaði ídnaðarframleiðsla av matvørum í Føroyum um leið eitt prosent.

gjaldoyra - ikki brosmuflak, saltfisk ella laxaflak. Føroyski brúkarin spyr eftir tí innflutningi, sum fæst fyri fiskin, heldur enn eftir hvat fiskaslag ella vøruslag, sum útflutt varð. Fyri brúkaran hevur útflutningurin bara týdning sum rætturin at innflyta vørur, uttan at varandi álvarsligt hall kemur á gjaldsjavnan. innfluttum teldum, bilum og grønmeti enn eftir fiski.

Vinnubýtið er tí hugsað soleiðis:

1. Vinnur sum framleiða til útflutnings ella í kapping við innflutning (fiskiveiði, fiskavirking, aling, landbúnaður, ølbrygging, plastvirki, trolvirki o.a.), har nógv størsti parturin er fiskivinna av ymsum slagi. Hetta verður eisini kalla gjaldoyraframleiðsla.
2. Vinnur sum framleiða til heimamarknaðin, privatar eins og almennar (Flutningur innanlands, handlar, bygging, orkuveiting, pengastovnar og tryggingar, persónligar og vinnuligar tænastur, allar almennar tænastur).

Hetta skal ikki skiljast soleiðis at einstøku fyritøkurnar ikki kunnu framleiða í báðum geirum, tí einstakar fyritøkur selja bæði uttanlands og í Føroyum. Men kortini ber til at skilja alt tað vinnuliga virksemið, sum í høvuðsheitum er treytað av altjóða galdandi prísum, í ein bólk fyri seg.

### 3.1.1 Gjaldoyraframleiðsla

Prísirnir fyri laxin hjá alivirkinum eru ásettir alt eftir framboð og eftirspurn á altjóða marknaðum, og føroysku fyritøkurnar hava millum lítið og einki árin á prísin. Tær mugu leita eftir marknaðum, sum hóska her og nú til teirra vøruúrval. Fyritøkur, sum framleiða í kapping við innflutning, sum t.d. plastvirki og bryggjarí mugu í ávísan mun kappast við prísin á innfluttum vørum, men mangan hava tær ávísar fyrimunir í siðvenju ella bara tí at keypararnir stuðla føroyskari framleiðslu.

Ein avleiðing av hesum býti er hon, at inntøkan hjá vinnunum í fyrra bólkinum eru í útlendskum gjaldoyra. At kalla einki av úrtøkuni hjá fiskivinnuni og alivinnuni er í "føroyskum krónum" á føroyska marknaðinum[12].

[12] Í tjóðarroknskapi er Danmark útland, og søla í Danmark er útflutningur. Tá alivirkið selur flak í

Tann nøgd av gjaldoyra, sum føroyskar fyritøkur selja útlendingum vørur og tænastur fyri, gevur føroyska brúkaranum høvi til at innflyta fyri júst tær upphæddirnar av útlendskum vørum og tænastum. Gjaldoyrainntøkurnar hava sostatt ongan annan týdning fyri føroyska brúkaran, at hann kann keypa innflutning fyri tær. Av hesum eginleika er vanligt í búskaparfrøði at staðfesta, at vinnurnar í fyrra bólkinum framleiða gjaldoyra. Uttan mun til um tær selja útlendingum fisk, trol, øl ella flogferðir[13].

Vinnur, sum á hendan hátt framleiða gjaldoyra, eru tí eisini í kapping á altjóða marknaðum, og mugu tí ganga undir tey kor, sum har eru. Ein av fyrimununum er, at marknaðirnir eru stórir, og at fyritøkurnar kunnu selja óavmarkaða nøgd, um tær klára seg fyri teir prísirnar, sum galdandi eru. Men tað merkir so eisini, at prísurin ikki er treytaður av hvussu nógv føroysku fyritøkurnar selja, og hjá teimum tykist prísurin fastur. Her eru sostatt ikki somu kor galdandi sum á heimamarknaðinum, har føroyska framboðið av t.d. húsasmíði og lastbilaflutningi hevur árin á prísin.

Stóru tilfeingisvinnurnar, fiskivinna og aling, eru tær sum framleiða mest av gjaldoyra. Men tær eru samstundis eisini tilfeingisvinnur, sum eru eyðkendar av, at tær umframt arbeiði og kapitalútgerð eisini brúka náttúrutilfeingi sum framleiðslutátt[14]. Framleiddu vørurnar í fiskiskapi og aling eru fiskavørur til útflutnings, og tað er skiftandi eftirspurn á altjóða marknaðunum sum avger prísin. Fiskur verður tí seldur í altjóða kapping, og tí flokka vit fiskiveiði og aling upp í vinnur í altjóða kapping.

Í báðum vinnum - aling og fiskiveiði - er atgongdin til náttúrutilfeingi kortini vard móti altjóða kapping (og vart móti kapping yvirhøvur!), tí loyvini verða latin úrvaldum føroyskum fyritøkum. Útlendskur kapitalur sleppur heldur ikki í nakran serligan mun at gera íløgur í fiskiskip. Tá talan er um marknaðirnar fyri framleiðslutættirnar, kapital og tilfeingi, er altso ikki altjóða kapping á jøvnum føti.

---

Danmark fyri danskar krónur, er talan um útflutning. Tá alivirkið selur fyri danskar krónur í føroyskum handli, er sølan ikki útflutningur, hóast gjaldoyrað formliga er hitt sama.

[13]Sama er galdandi tær fyritøkur, sum selja okkum vørur í kapping við innflutning. Tær spara okkum gjaldoyraútreiðsluna, sum í samantalda roknskapinum telur á sama hátt, sum at fáa somu upphædd sum gjaldoyrainntøku

[14]Framleiðslutættir eita á enskum *factors of production*

Vinnur sum framleiða gjaldoyra eru tí prístakarar, og eftirspurnin er púra elastisk og kann grafiskt myndast horisontal. Vinnur sum mest tæna heimamarknaðinum, vardar vinnur[15], hava harafturímóti vanliga elastiska eftirspurn.

Í myndlinum eru tí bara tveir geirar – vinnur sum framleiðir gjaldoyra og heimamarknaðarvinna.

Mest avgerandi íkastið frá tilfeingisgeiranum er nøgdin av útlendskum gjaldoyra, hann megnar at veita búskapinum á hvørjum ári. At útflutningsvinnurnar framleiða toskaflak, ísaða hýsu ella frystan lax, fær føroyski brúkarin ikki tað stóra gagnið av. Mesta gagnið vær føroyski brúkarin av tí gjaldoyra, sum útflutningsvinnurnar umvegis hava kastað av sær. Gjaldoyrainntøkurnar eru tær, sum innflutningurin skal keypast fyri, og tí umboðar hvørt krónuvirði í útflutningi høvið at innflyta vørur ella tænastur fyri eina krónu.

Tann parturin av útflutningsvirðinum, sum skaptur er av arbeiðinum í alifyritøkuni, á flakavirkinum og umborð á skipinum er tí at rokna sum gjaldoyraframleiðsla. Tann parturin av útflutninginum, sum stavar úr tilfeingisvirðinum sjálvum (tilfeingisrentan), er at rokna sum gjaldoyragáva[16].

Í myndlinum hugsa vit okkum íkastið frá arbeiði og kapitali í tilfeingisvinnuni at vera støðugt, meðan øll variasjónin stendst av marknaðarligum og náttúrugivnum sveiggjum. Tí hugsa vit okkum at íkastið frá tilfeinginum til búskapin, tilfeingisrentan, er púra lík íkastinum frá donsku ríkisveitingini – ein gjaldoyragáva. Íkastið er ein gáva, tí at hvørki arbeiðskraft ella kapitalur frammaldu virðið, sum tilfeingið hevur. Í hesum sniði verður besti alternativkostnaður roknaður arbeiðskraft og kapitali, eins og siður er í slíkum greiningum[17]. Føroyska tilfeingi, sum gevur hesi íkast eru í hesum umfari fiskurin undir føroyskum ræði og alifirðirnir. Saman við donsku ríkisveitingini eru tey mett at veita búskapinum eina potensielt varandi gjaldoyrainntøku, sum telir umleið 15 prosent av BTÚ.

---

[15]At vinnur eru vardar, merkir at prísásetingin á ein ella annan hátt er vard frá tí prísáseting, sum fer framm á heimsmarknaðinum ella onkrum slag av millumtjóða marknaði.

[16]Heitið gjaldoyragáva hevur uppruna í norskari búskaparfrøði, Sjá Norman (1986), Torvik (2001), Røisland and Torvik (2004) og Rødseth (2000), men hugtakið er einki øðrvísi enn hjá Corden and Neary (1982) og Sachs and Warner (1995) og øðrum høvundum, sum greina Hálendska sjúku

[17]Sjá Gordon (1954), Bjorndal and Munro (2012) og Búskaparráðið (2014)

### 3.1.2 Heimamarknaður

Vælferðin, sum stendur føroyska brúkaranum í boði, er hon sum framleidd verður av heimamarknaðarvinnunum, sum neyvari orðað á enskum verða kallaðar *"non-tradables"* framleiðarar. Tað vil siga at vørurnar og tænasturnar verða í høvuðsheitum brúktar á staðnum, og kunnu illa flytast um landamark til nýtslu. Handilstænastur, vinnuligar og privatar tænastur, handverk og almennar tænastur eru nakrar teirra sum rúgva mest. Skilligt er tí eisini at vælferðin í stóran mun kann mátast eftir, hvussu stórt og gott framboðið av tænastum á heimamarknaðinum er. Tá minst møguligt av fólki og kapitali eru bundin til framleiðslu til útflutnings (neyvari: *"tradables"* framleiðslu), í mun til eftirspurnina hjá brúkarunum av ávikavist innfluttum vørum og tænastum á heimamarknaðinum, er vælferðin hin mesta hon fær verið.

Vinnurnar, sum í høvuðsheitum selja til heimamarknaðin, mugu selja til teir prísir, sum verða skaptir á hesum pinkulítla marknaði, alt eftir famboð og eftirspurn. Eitt nú sveiggja prísirnir á húsasmíði alt eftir eftirspurnini á føroyska marknaðinum og eftir tí tali av húsasmiðum, sum eru til taks. Lastbilafyritøkan fær ikki selt fleiri túrar, enn eftirspurdir verða á heimamarknaðinum. Aðrir prísir á heimamarknaðinum eru merktir av at frambjóðararnir eru fáir, ella at teir hava einkarrætt, so sum pengastovnar, telefyritøkur, tryggingar og orkuveitarar.

Heimamarknaðarvinnurnar eru í fyrsta lagi allar almennar tænastur, og síðani allar tænastur, sum mest at kalla mugu keypast heima; slíkt sum flutningur, húsarhaldstænastur, matstovur, handil, flestu einstaklingatænastur, eins og vinnuligar tænastur sum fígging, trygging, ráðgeving o.m.a. Hesar telja í umleið 75 prosent av búskapinum.

### 3.1.3 Fiskaídnaðurin

Størsta ídnaðarvinna í Føroyum er matvøruídnaðurin, sum umfatar fiskavirkini og kryvjivirki, og so einstakar aðrar fyritøkur. Sum Mynd 3 vísir, so taldi matvøruídnaður mestsum sama lítla prosentpart í 1970 og í 2018. Nøkur av 1980 árunum og inn í 1990 árini var eitt vet

meira av fiskavøruídnað, men tá fekk hann so nógvan beinleiðis pengastudning, at hann ikki kundi sigast at vera í altjóða kapping – ella í kapping yvirhøvur. Saman um tikið telir matvøruídnaðurin mestsum sama part av virðisøkingini í 2018 sum í 1970.

Í dag er stuðulin til fiskavirking ikki beinleiðis men heldur umvegis, á tann hátt at tað í fyrra lagi við lóg er bannað føroyskum fiskiførum at landa fisk uttanlands. Brot verða sektað við at taka 30 prosent av søluvirðinum í revsigjaldi[18]. At tað kortini ikki er bannað fiskakeyparanum at selja óvirkaðan fisk av landinum, man koma av at tað í nógvum førum loysir seg betur at selja fiskin óvirkaðan av landinum. Onnur orsøkin er at í somu lóg er ásett, at fiskiførum er bannað at virka fiskin umborð[19].




Mynd 3

Hóast Løgtingið hevur avgjørt at verja fiskavirkingina við serligum løgtingslógum, so verður sera lítið framleitt av lidnari vøru á føroyskum fiskavirkjum og kryvjivirkjum. Meginparturin av fiskinum verða útfluttur óvirkaður, mestsum bara haldgóðskaður til flutnings.

Ongin kann tí kappast við virki sum standa við sjálva ta føroysku bryggjutromina, sum Løgtingið hevur lóggivið fiskin tvørturum. Fiskurin, sum tikin verður úr aliringunum má sjálvsagt eisini haldgóðskast beinanvegin, og stórvegis meira verður ikki gjørt við meginpartin av fiskinum.

Í hesum høpi er tí avgjørt at rokna fiskavirkini upp í tilfeingisvinnurnar, fiskiveiði og aling. Virkini eru ikki í veruligari altjóða kapping, tí tey fáa frammíhjá (exklusiva) atgongd til rávøruna. Í øðrum lagi tí at úrrtøkan er mest at kalla haldgóðsking og ávegis úrtøka til

[18]Fyrsta stykki í grein 41 í ”Løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi” bannar fiskiførum at avreiða uttanlands, og í stykki 5 í somu grein 41 er sektin ásett.

[19]Virking umborð er bannað sambært stykki 1 í grein 38 í ”Løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi”.

meirvirkingar aðrastaðir, sum er nær tengdur partur at sjálvum fiskiskapinum, og mestur hevði farið framm á sjónum, um lógirnar ikki forðaðu fyri tí.

Mett verður tí her, at var jøvn kapping um landamark, og ongar avmarkingar vóru á viðgerð um borð á fiskiførunum, so fór í fyrra lagi meginparturin av ávegis virking og haldgóðsking framm um borð á fiskiførunum. Mestsum ongin virking hevði tá farið framm á landi í Føroyum. Av frammanfyri nevndu ávum, eru í hesari viðgerðini fiskavirkini løgd aftrat veiðiliðinum, og kryvjivirkini aftrat alingini í ein bólk - tilfeingisvinnur

Onki er til hindurs fyri at skilja virkingina frá tilfeingisliðinum í eini aðrari myndlaviðgerð, tí í slíkari samanseting fáast eisini áhugaverd úrslit, sum ikki víkja munandi frá hesari.

## 3.2 Langt og stutt sýni - og tillaging

Sum skilst verður í langa sýninum gongdin tann, at fiskiveiði og tilfeingisvinnur gerast meira effektivar og tí arbeiðir munandi minni partur av arbeiðsfjøldini í vinnum, sum framleiða vørur til útflutnings, enn fyri 30 árum síðan[20]. Haraftrat hevur víst seg, at troytiliga tilfeingið er vorðið meira ríkiligt, og ikki minst at útlendska eftirspurnin hevur verið vaxandi.

Í stutta sýninum hendir kortini so mangt, sum órógvar myndina av tí sum hendir í langa sýninum. Fiskaprísir kunnu fara upp og niður, ymiskt er hvussu fiskiskapurin er, hvussu stórar kvoturnar í fremmandum sjógvi eru, sjúka í alifiski og so framvegis. Í stutta sýninum kunnu útflutningsvinnur bæði rúmkast og tódna í vavi í mun til aðrar vinnur.

So hvørt útflutningsvinnurnar í langa sýninum gerast meira effektivar, tørvar teimum færri hendur til arbeiðis, fyri at framleiða í minsta lagi sama virði sum frammanundan - helst størri virði. Vit eru sostatt vorðin ríkari so hvørt sum útflutningsvinnurnar eru minkaðar í vavi. Vælferðin í 2020 er munandi størri, mátað í roynveruligari bruttotjóðarúrtøku, enn hon var í 1990, hóast løntakararnir tá vóru nærum tvífalt so nógvir í útflutningsvinnunum.

Øvut tykist at vera í stutta sýninum: eitt nú tá útflutningsvinnurnar minka av fiskaloysi, prísfalli ella øðrum árinum, hevur tað við sær at fyritøkur í útflutningsvinnum fara á húsagang

[20] Parturin av løntakarum í fiskiveiði, fiskavirking og alivinnu var í 1990 heili 80 prosent størri enn hann var í 2020. Í 1990 var prosentparturin 26,8 og í 2020 var hann 14,8.

og fólk verða send til hús í arbeiðsloysi. Hetta merkist í øllum samfelagnum vegna minking í øðrum atknýttum virksemi og minking í eftirspurn eftir heimamarknaðartænastum. Skattainntøkurnar minka og tí má tað almenna økja læna pengar til virksemið og samfelagsligar ábyrgdir annars. Í stutta sýninum tykjast vit verða fátækari, tá løntakararnir minka í tali í útflutningsvinnunum.

Íkastið frá fiskiveiði og aling í samfelagsbúskapin er tí í tveimum deildum:

- Samfelagið verður ríkari í langa sýninum tá tilfeingið gerst meira virðismikið ella virðisøkingin gerst meira effektiv og krevur minni fólk til arbeiðis
- Samfelagið verður í stutta og miðal sýninum órógvað tá stoytir uttaneftir raka vinnurnar so at virksemi og prísir skeiklast

Tað kann tí mangan vera torført at síggja greitt nær talan er um eina av gagnligu tillagingunum í langa sýninum til eina effektivari útflutningsvinnu, og hinvegin nær talan er um ógagnlig búskaparlig aftursveiggj í stutta sýninum. Útflutningsvinnurnar hava soleiðis tvinni árin á vælferðina. Í langa sýninum verða tær meira effektivar og krevja minni fólk í arbeiði, sum tí kunnu framleiða aðrar tænastur, samstundis sum úrtøkan vexur við somu ferð í útflutningsvinnunum. Soleiðis vexur vælferðin samanlagt.

Í stutta sýninum eru tað serstakliga útflutningsvinnurnar, sum bera búskaparsveiggini inn á búskapin og elva búskaparliga órógv. Javnan standast bráðfeingis aftursveiggj ella framsveiggj av at fiskaprísir fara upp ella niður á útlendskum marknaðum, av at varandi ovurfisking elvir minkandi úrtøku á sjónum, av smærri ella størri altjóða kvotum, av ríkiligari tilgongd av vælkendum ella óroyndum fiskasløgum, ella av sjúkum í alifiski og øðrum slíkum hendingum, sum bera stoytir uttaneftir inn í búskapin.

Føroyskur búskapur er lítið granskaður, og vita vit tí ikki so nógv um gongdina og um sveiggini (trendin og variasjónina) í búskapinum, og hava enn minni nakrar haldfastar greiningar av hvørji árinini hava ávikavist verið til hitt drúgva rákið og hina bráðfeingis variasjónina.

Tað, vit nevna miðal sýnið[21], er júst tann tillagingin sum fer framm, tá prísir og lønir trekliga laga seg til broytt viðurskifti, samstundis sum kapitalur flytir millum vinnugreinir. Her er altso ikki talan um heilt stutta sýnið tá einans trýstið frá prísbroytingum eru at hóma, men ongin lønartillaging ella rentutillaging er farin framm. Her er heldur ikki talan um langsýnis steady-state lýsingina av íkasti frá broytingum í tøkni ella broytingum í útbúgvingarstiginum til steady-state búskaparvøxtur.

Lýsingin av miðal langa sýninum fer framm millum annað í AS-AD myndlinum, har trekir prísir og lønir fáa stundir at laga seg eftir broyttu viðurskiftunum, og kapitalur somuleiðis sleppir at flyta eftir frægasta íkastinum. Talan er sostatt um lyndið hjá búskapinum at finna aftur til okkurt slag av nýggjari javnvág, tá stoytur skumpar búskapin úr áður galdandi javnvág.

Tá politisk støða skal takast til hvussu Føroyar búskaparliga skulu laga seg til broytt viðurskifti (sum vit her kalla "stoytir"), er neyðugt at vita eitt sindur um teir. Eitt nú hvussu umfatandi teir eru, hvønn teir raka og so framvegis. Eitt av teimum eyðkennunum, vit mugu vita nakað um, er hvørt talan er um bráðfeingis ella um varandi broytingar í viðurskiftunum. Fara oljuprísirnir brádliga upp til tvífaldan prís, vænta vit helst at talan er um bráðfeingis stoyt, og at prísirnir fara rættuliga skjótt niður aftur. Koma nýggj fiskasløg inn undir føroyskt ræði, kann vera meira torført at vita um tey verða verandi ella hvørva aftur.

Hóast føroyski búskapurin er pinkulítil, háttar hann sær sum heild eins og aðrir búskapir. Sjálvandi er pinkubúskapurin meira kykur enn stóru búskapirnir, tí at árin uttaneftir aloftast hava størri árin á til dømis føroyska búskapin heldur enn á tann týska ella svenska. Sveiggini í føroyska búskapinum eru væl størri enn sveiggini í danska búskapinum, sum er um leið hundrað ferðir størri. Munur stendst eisini av um lond hava ymisk gjaldoyraviðurskifti: lond við føstum gjaldoyravirði mugu laga seg til broytingar á annan hátt enn lond við flótandi gjaldoyra. Við føstum gjaldoyravirði, knýtt at donsku krónuni og soleiðis umvegis at evruni,

[21] Hvat miðal sýnið er, er møguliga ikki so heilt greitt skilmarkað. Sjá t.d. Robert M. Solow (2000) og Blanchard (1997)

má tillagingin henda antin í lønarlagnum ella í talinum av arbeiðarum. Hetta gav at býta undir kreppuni í 1990 árunum, tá stívliga ein sjeyndapartur av fólkinum rýmdi av landinum og lønarlagið lækkaði munandi í mun til lønarlagið í øðrum londum.

Tað er heilt avgerandi fyri eina og hvørja samfelagsbúskaparfrøðiliga viðgerð av føroyskum viðurskiftum, at hesi omanfyri nevndu viðurskiftini eru grundarlagið undir myndlinum. Tí skulu nú greinast nærri tær báðar mest avgerandi fortreytirnar, sum umframt støddina á búskapinum, eru avgerandi fyri hvussu búskapurin virkar: í fyrra lagi at stoytirnir á búskapin koma uttaneftir, og í øðrum lagi at tilfeingisvirðið er so ríkiligt í útflutninginum.

## 3.3 Stoytirnir koma uttaneftir

Føroyar eru, pinkulondum líkt, viðbreknar fyri stoyti á heilt annan hátt enn onnur størri lond[22]. Føroyar útflyta at kalla eina vøru, fisk, og eru tí sera viðbreknar fyri stoyti sum raka náttúrukorini hjá fiskinum ella marknaðirnar við fiskavørum. Onnur størri lond við breiðum úrvali av ídnaðarvørum, verða tessvegna ikki eins meint rakt, bæði tí at tey hava stórt úrval av vørum og tænastum at selja, og tí at marknaðirnir eru nógvir fyri hvørja úrtøkuna tey bjóða framm.

Upp í smáar opnar búskapir verða í búskaparfrøði roknað lond sum Kanada, Avstralia, Italia og Ongland. Heilt smá lond verða roknað slík sum Írland, Grikkaland, Danmark og Svøríki. Pinkulond eru mangan roknað at vera tey við minni enn einari miljón íbúgvum, og her telist Ísland (sum hevur sjey ferðir fólkatalið í Føroyum) millum tey smáu. Føroyar eru tí mest at kalla pinkuland pinkulanda.

Stoytirnir á búskapin koma tí mestsum bara uttaneftir. Teir stoytir og tey bakkøst, sum stava frá búskaparpolitiskum vannsketni, koma mangan aftan á externu stoytirnar, tí at fyrisiting og politikarar eru illa skødd at handfara torførar avbjóðingar. Upprunaligi stoyturin, sum rakti føroyska búskapin um miðju 1970 árini, var av tí slag vit kalla framboðsstoytur, "supply shock" á enskum. Tað var ivaleysa meinur stoytur at fáa, at fiskiflotin

[22] Sjá Briguglio (1995) og Briguglio et al. (2009)

skuldi leggja um at fiska í høvuðsheitum í føroyskum øki, aftan á at hava kunna troytt onnur høv so leingi. At stoyturin gjørdist ramasta kreppa nakrantíð, og endaði við húsagangi landsins í 1992, stóðst kortini mest av tí ábyrgdarleysa politikki, sum fákunnir politikarar og skirvislig fyrisiting í meira enn tíggju ár drógu Føroyar ígjøgnum[23].

Negativi stoyturin í 2003 kom av sjúku í alifirðunum, meðan positivi stoyturin frá nýtilkomna uppsjóvartilfeinginum, sum enn stendur við, byrjaði í 2010. Endurtikin sveiggj í nøgdum og prísum í útflutningi vitna um eitt pinkuland, sum livir og andar við árinum uttaneftir – úr havinum og av fremmandum marknaðum.

Tá negativir stoytir úr altjóða prísum og úr fiskastovnum skeikla búskapargongdina, røkkur fíggjarpolitikkur ikki til at rætta støðuna. Tað rínir jú hvørki við altjóða marknaðarrákið ella fiskastovnarnar, at stýrt verður upp ímóti við fíggjarpolitikki. Soleiðis er ikki tá stoytirnir í stóran mun hava innlendis uppruna, sum títtari eru í ídnaðarlondum, tí tú kannst bæði tálma og skunda undir húsarhaldsnýtsluna og íløgurnar við fíggjarpolitiskum amboðum. Og tá er mangan talan um samantvinnaði átøk av pengapolitiskum og fíggjarpolitiskum slagi, eins og at gjaldoyravirðið eisini gevur seg undir slíkum umstøðum.

## 3.4 Tilfeingisrentan í útflutninginum

Lønarkappingarførið í ídnaðarlondum hevur serstakliga stóran týdning fyri fyritøkur í útflutningi í stutta sýninum, tí í kappingini ræður um hjá fyritøkunum, at lønin hjá arbeiðaranum ikki fer so langt upp, at fyritøkan ikki megnar at framleiða vøruna til givna prísin á heimsmarknaðinum. Tá er fyritøkan ikki kappingarfør longur, og framleiðslan minkar. Heilt avgerandi eru tí produktiviteturin og lønin hjá arbeiðaranum

Soleiðis er støðan ikki við útflutningi av fiski, tí at fiskur er ikki ídnaðarvøra Hann verður harafturímóti framleiddur úr náttúrutilfeingi eins og ráolja, kopar, jarn, korn, banan, kaffi, sukur og so framvegis. Undir framleiðsluni av fiski sum útflutningsvøru eru tí tríggir tættir, sum geva hvør sítt íkast til framleiðsluna: arbeiði, kapitalur og náttúrutilfeingi.

[23]Støðan hesum viðvíkjandi í pinkulondum er væl lýst hjá Farrugia (1993), Þórhallsson (2010) og Þórhallsson (2011)

Í fiskivinnu er tað náttúrutilfeingið, havið, sum elur fiskin frá yngli til stóran fisk, meðan kapitalur og arbeiði fáa hann upp úr sjónum, og virkaðan ávegis til útflutnings. Í alivinnu er tað somuleiðis náttúrutilfeingið, væl egnaðu alifirðirnir, sum eru grundarlagið undir vøxtrinum frá smolt til stóran tøkufisk, meðan kapitalur og arbeiði luttaka í allari tilgerðini.

Hugsa vit okkum at marginala úrtøkan hjá arbeiðaranum í Føroyum er munandi lægri enn tann í Noreg og Íslandi, verða framvegis eingir trupulleikar at sleppa av við fiskin. Bæði fiskimaðurin og reiðarin fáa ríkiligt í sín part, av tí at tann triði parturin - náttúrutilfeingið - einki fær í sín part[24]. Ymiskt er hvussu væl fiskastovnar eru fyri og hvussu væl fiskiveiðin er skipað, men í væl riknari fiskiveiði stava um leið fimmti prosent av virðinum av hvørjum avreiddum kilo av fiski úr tí marknaðarvirði, fiskurin hevði meðan hann framvegis svam í sjónum[25] sum er sjálv tilfeingisrentan. Hetta samsvarar væl við teir prísir, ið fyritøkurnar guldu í uppboðssølunum, sum verið hava um uppsjóvarfiskin í Føroyum. Rættindini at fiska makrel og sild frá 2016 til 2019 vóru í flestu førum seld fyri kiloprísir um leið og oman fyri 50 prosent av miðal avreiðingarvirðinum[26]. Í Íslandi var miðal leiguprísurin á kvotum um leið 60 prosent av avreiðingarvirðinum fyri tosk, hýsu, upsa, makrel og sild[27].

Júst sama skil er galdandi í alivinnuni, sum galdandi er í fiskivinnuni. Í fiskivinnuni er sjálvur fiskurin í sjónum tað náttúrutilfeingið, sum goldið ikki verður fyri í dag. Í alivinnuni eru tað firðirnir og teirra frálíku alifortreytir í sjóvarhita, vatnskifti, streymviðurskiftum, saltinnihaldi og so framvegis – eitt náttúrligt habitat, sum hevur risastórt marknaðarvirði. Eins og í fiskivinnuni, er í alivinnuni ikki neyðugt hjá fyritøkuni at halda lønirnar lágar, fyri at yvirliva á marknaðinum, men bara fyri at broyta býtið millum arbeiði og kapital.

Á henda hátt er virðið á tilfeinginum sjálvum eins og eitt fríholt millum lønirnar og kapitalavkastið í útflutningsvinnunum øðrumegin og prísin á marknaðinum hinumegin.

[24]Smávegis av tilfeingisgjøldum eru kortini áløgd aling og fiskiveiði. At serskattir taka part av vinninginum hjá reiðaríunum inn aftur, er ikki fyrra býtinum viðkomandi.

[25]Sjá síða 290 í F. Asche et al. (2009), og eisini Frank Asche et al. (2018), Wilen (2000), Daníelsson (2002), Gunnlaugsson et al. (2020), Matthíasson (2012) og Hannesson (2017)

[26]Sambært uppgerðum frá Fiskimálaráðnum fyri 2018 og 2019 var miðalprísurin á rættindunum at fiska makrel ávikavist 67 og 77 prosent av avreiðingarvirðinum, meðan prísuri á rættindunum at fiska norðhavssild var 56 prosent av avreiðingarvirðinum bæði árini

[27]Sjá talvurnar A.1 og A.2 í Talvur

## 3.5 Samanhangurin

Útfluttu Føroyar eina einstaka ídnaðarvøru[28], var eingin tilfeingisrenta uppi í útflutningsvirðinum. Fóru marknaðarprísirnir niður, fóru fyritøkur eisini á húsagang, sum ikki høvdu nóg stóra úrtøku upp á hvønn arbeiðaran, og arbeiðsloysið hevði tí vaxið. Útflutningurin hevði tá minkað og hall komið á handilsjavnan. Sum frá leið hevði lønarlagið skula lækkað aftur, fyri at fyritøkurnar í útflutningi skuldu megnað at farið undir framleiðslu aftur.

Búskapir við eintáttaðum útflutningi eru viðbreknir fyri stoyti uttaneftir, uttan mun til um útflutningsvøran er ídnaðarvøra ella tilfeingisvøra. Eru vørurnar fáar og marknaðirnir fáir, verður títtari at sveiggj í eftirspurn fáa so stór árin á lítla útflutningsbúskapin. Órógv á enska marknaðinum fyri hvítan fisk og órógv á russiska marknaðinum fyri alifisk rakar ikki bara einstakar føroyskar fyritøkur, men rakar alt samfelagið. Eyðkent fyri pinkubúskapir er tí at avgerandi stoytirnir koma uttaneftir.

Haraftrat stavar stórur partur av útflutningsvirðinum frá náttúruni, sum undir skiftandi korum alir fram tilfeingisvirðini. Tey skifti og tær broytingar sum í náttúruni henda, elva eisini búskaparligar stoytir á búskapin, tá fiskastovnar minka ella sjúka kemur í alifisk. Hetta eru eisini stoytir sum koma uttaneftir, skilt á tann hátt at teir ikki koma innan úr føroyska búskapinum sjálvum.

Tá útflutningsvøran er tilfeingisvøra (olja, fiskur, málmur) eru tað ikki virðini á marginalu produktunum hjá kapitali og arbeiði, sum koma undir trýst. Áðrenn tey nakrantíð verða rakt av einum prísfalli, er tað tilfeingisrentan sum tekur stoytin. Ríkiligheitin av henni hevur við sær, at fiskurin verður framvegis fiskaður, haldgóðskaður og útfluttur[29].

Partvíst er tað so at útflutningsvinnurnar eru tær, sum bera stoytirnar uttaneftir inn í búskapin. Men samstundis er ongin vandi fyri útflutninginum, tí at tilfeingisvirðini eru so ríkilig.

[28]Martin Paldam metti til dømis at føroyingar kundu kappast við umheimin um at seyma Adidas bóltar

[29]Soleiðis er tá stoyturin kemur av marknaðunum. Tá fiskaloysi er, verður støðan ein onnur. Tá er avmarkað hvussu nógv kann virkast, og tí verður hall á handilsjavnanum, virksemið minkar helst og inntøkurnar minka.

Hesir tveir heilt serligu eginleikar eru teir, sum í stutta sýninum gera stóra munin hvussu føroyskur og til dømis danskur búskapur hvør sær virka, og teir gera eisini stóra munin hvussu fortreytirnar eru at reka fíggjarpolitikk[30].

# 4 Tillaging til broytingar

Í hesum myndlinum verður fiskavirking av ymsum slagi roknað sum partur av fiskiveiði og sum partur av alingini sjálvari. Vit ímynda okkum at virking av fiski hendir í alingini og fiskiveiðini sjálvari, sum her er sligin saman í eina vinnu við exogent ásettum altjóða prísum. Hetta er grundað á fortreytirnar í parti 3, sum staðfestir samanhangin millum tilfeingispartin og góðskingarpartin í fiskivinnu og alivinnu.

Eftir eru tá bara vardar vinnur og ein tilfeingisgeiri í altjóða kapping (fiskiveiði og aling, fiskavirki og kryvjivirki íroknað).

Í tilfeingisgeiranum eru bara exogenir variablar, so at marknaðarligar ella náttúrugivnar hendingar geva størri ella minni úrtøku. Hetta sendir síðani stoytir á restina av búskapinum vegna størri ella minni eftirspurn eftir heimamarknaðarvørum [31].

Stóri geirin í búskapinum er tann við vardu vinnunum – almennum og privatum tænastum, bygging, veitingarvirkjum, flutningi og øðrum tílíkum sum bara kann keypast á staðnum. Hann er í veruleikanum einasti geirin sum er virkin í myndlinum á tann hátt at prísir og lønir verða avgjørd í sjálvum myndlinum. Tá inntøkur verða sprændar inn í búskapin frá stoyti í tilfeingisgeiranum, fara inntøkurnar í tilfeingisgeiranum upp. Hann eftirspyr kortini ikki meira arbeiðsorku, tí eftirspurnarkurvan er loddrøtt. Einasta fylgjan er tí meira eftirspurn eftir innlendskum tænastum og eftirspurnin eftir innfluttum vørum, men tær hava ikki stórvegis týdning í hesum einfalda myndlinum, sum bara umfatar framleiðsluna í landinum.

[30] Londini bæði hava sama gjaldoyra, sum bundið er at Evruni, og tí kann serstakur pengapolitikkur ikki koma upp á tal.

[31] Minnst kortini til at talan er her ikki um heilt langa sýnið tá tøkniligur framburður í stóran mun sleppur vinnuni av við arbeiðsfólk og krevur meira kapitalíløgur upp á fólkið.

## 5 Úrtøkiligir men hentir myndlar

Sonevndir vesturlendskir kapitalistiskir búskapir virka í prinsippinum eins, ríkir sum fátækir, stórir sum smáir. Eisini teir pinkulítlu, sum tann føroyski. Teir kunnu vera meira ella minni marknaðarstýrdir, men allir eru teir eitt ella annað bland av marknaðarligum og almennum virksemi. Teir eru kapitalistiskir búskapir, sum virka eftir somu meginreglum, sum búskaparfrøðin í um leið hálvt annað hundrað ár hevur roynt at greina.

Mangan brúka vit búskaparfrøðingar hetta heitið "ein búskapur" um tað fyribrigdi, vit vanliga nevna "eitt land" ella "eitt samfelag". Ella rættari sagt: tann partin av samfelagnum, sum hevur týdning fyri verðsligu vælferðina hjá borgarunum. Restina av samfelagnum lata vit káma burtur í myndini, so at eftir stendur bara búskaparligi parturin. Tað vit sipa til við heitinum "búskapurin" er tí ikki hitt veruligt ella sannroynda fyribrigdið, men heldur tann abstrakta skitsan sum vit hava í høvdinum, tá vit royna at orða lærdar setningar um búskapin.

Mangt av tí sum her verður skrivað krevur tí at tú mást trína inn í hendan úrtøkiliga hugaheimin, sum er grundaður á sonn og roynverulig hagtøl, men sum samstundis karvar allan óneyðugan veruleika burtur, fyri at halga sær sjálva búskaparfrøðiligu kjarnuna í málinum. Ikki í hástórari burturkveistring, men heldur í viðurkenning av at alla restina megna vit ikki at handfara við okkara amboðum.

## 6 Einfaldur ástøðiligur myndil

Mynd 4 vísir ástøðiliga myndilin í javnvág[32]. Her eru strikumyndir av báðum geirum at síggja, tilfeingisvinnunum (gjaldoyravinnunum) og heimamarknaðinum.

Vinstrumegin er gjaldoyramarknaðurin, sum bara hevur framboðsstrikuna S og onga eftirspurnarstriku, tí alt verður selt fyri tann uttanífrá givna heimsmarknaðarprísin P, sum

[32] Myndilin, sum her er vístur í myndum, byggir á kapittul 7 í Rødseth (2000), Røisland and Torvik (2004) og Torvik (2018) við tí muni kortini, at ongin ídnaður í altjóða kapping er uppií

vit kunnu uppfata sum vigaða miðalprísin á øllum útflutningsvørum.




(a) Gjaldoyramarknaðurin




(b) Heimamarknaðurin

Mynd 4: Í tilfeingisvinnunum á gjaldoyramarknaðinum (4a), er veiða og tøka av fiski givin alt eftir náttúruumstøðum og viðseting, og prísurin er givin uttaneftir. Haraftrat koma veitingarnar frá ríkinum. Á heimamarknaðinum (4b) laga prísir, framboð og eftirspurn seg á marknaðinum.

Øll úrtøkan úr hesum vinnum er til útflutnings, og onki verður selt innanlands. Sæð úr Føroyum framleiðir hendan vinnan ikki fiskavørur, men heldur gjaldoyra til at keypa innflutning fyri. Tað, sum føroyski brúkarin fær burtur úr tilfeingisvinnuni, er at allur tann innflutningurin, sum vit hvørt ár eftirspyrja.

At vit her mynda búskapin við bara tveimum vinnugeirum í hesum einfalda myndlinum av føroyska búskapinum, stendst sostatt partvíst av at hagtølini vísa, at heilar vinnur í altjóða kapping eru at kalla ongar enn tilfeingisvinnurnar. Partvíst er grundin tann, at fyri fáa nakað brúkiligt burtur úr einari myndlagreining, so er neyðugt at kvetta burtur allar teir partar av veruleikanum, sum ikki eru avgerandi fyri at lýsa málið. Men fyrst nøkur orð um hví vit sum heild bara mynda búskapin við tveimum vinnugeirum.

At føroyski búskapurin verður myndaður so einfaldur, hevur tvær orsakir, sum báðar eru landafrøðiligar ella umhvørvisligar. Onnur er hon, at Føroyar eru fjarskotið pinkuland við sera lítlari arbeiðsfjøld. Í upphavi eru tí fáar vinnur og lítið úrval av vørum og tænastum sum verður framleitt í landinum.

Hin orsøkin er tann, sum stendst av at føroyski búskapurin fær í ríkiligt mát av fremmandum gjaldoyra til gávis, og sum elvir tað fyribrigdið vit nevna ”Hálendska sjúku”, sum aftur hevur tveir partar.

Tann fyrri parturin er at vegna tess at Føroyar fáa ríkisstuðul úr Danmark, er almenni geirin størri enn hann annars hevði verið[33]. Hetta máðar sjálvandi burtur av tí arbeiðsfjøld, sum eftir er til at aðra framleiðslu.

Hin parturin er lutfallsliga stóra náttúrutilfeingið, sum gevur landinum fyrimun til útflutning av tilfeingisvørum, av fiski. Tá normalur profittur og normal løn eru drigin burtur av inntøkunum fyri útfluttu vørurnar, fæst ein lutfallsliga stór upphædd í fremmandum gjaldoyra fyri tilfeingisrentuna – sum íkomin er uttan útreiðslur til løn og kapital.

Gávan[34] av fremmandum gjaldoyra er tí samløgan av donsku ríkisveitingini, tilfeingisrentuni úr fiskivinnuni og alivinnuni, sum tilsamans verður mett at vera um leið 3 miljardir um árið hesi seinastu árini. Gjaldoyragávan er tí um leið 15 prosent av BTÚ, sum er í ovara enda í heimshøpi. Í hesum flokkinum av londum er aloftast talan um miseydnað og blóðfátøk ríki, sum fáa altjóða hjálp móti hungursneyð og til endurreisn av samfelagnum, so sum Yemen, Miðafrikanska Lýðveldið, Liberia, Tonga oyggjarnar og Kiribati. Í øðrum førum er talan um lutfallsliga smá lond við risastórum gjalddoyrainntøkum av tilfeingisrentu frá kolvetni ella málmi, so sum Iraq, Kuwait, Saudi Arabia og Quatar[35].

Framboðið frá hesum vinnugreiranum, gjaldoyravinnunum, er tí samløgan av ríkisveitingini úr Danmark[36] og úrtøkuni úr fiskiveiði og aling. Hetta framboðið verður avmyndað sum steyrrøtt strika í strikumyndini í 4a. Eftirspurnarstrika er ongin, men bara ein fastur prísur, sum ímyndar árliga eindarvirðisvísitalið í útflutningi. Alt verður útflutt fyri hendan prís, sum føroyskar fyritøkur onga makt hava á.

[33]Sjá Búskaparráðið (2002) eftir eini greining av bygnaðinum í myndlinum, sum serliga vísir fjarstundar tillagingina, men í minni mun vísir karmarnar fyri fíggjarpolitikk.

[34]Heitið ”gáva” er ikki av tilvild. Hetta er tað virðið, sum náttúran sjálv hevur, umframt tað íkastið sum stavar frá arbeiðskraftini og kapitalinum í fiskivinnuni

[35]Sjá millum annað https://data.worldbank.org um ”Net ODA received (percent of GNI)” og ”Oil rents (percent of GDP)”

[36]Inntøkurnar frá danska ríkinum kann ímyndast sum kostnaðarleys vinna.

Í høgru síðu á Mynd 4, í (4b), er myndingin av varda heimamarknaðinum, sum má vera í javnvág, tí her skal alt framleiðast heima og brúkast heima. Prísir og nøgdir laga seg tí á marknaðinum so at vit fáa javnvágina í skurðpunktinum A. Her er vanliga negativa hallið á eftirspurnarstrikuni, vegna tess at vaxandi prísur elvir substitusjón til eftirspurn eftir innfluttum vørum og tænastum. Framboðið hevir vanliga positivt hall, tí at hægri prísir loyva brúki av meira og minni produktivum tilfeingi (um bert lønarvøxturin ikki er heilt tilsvarandi stórur).

Soleiðis er støðan avmyndað í javnvág, áðrenn stoytur rakar búskapin.

# 7 Fíggjarpolitikkur og kappingarføri

Búskaparfrøðingar eru vanir at meta um virknið av fíggjarpolitikki í eini heildarmynd av búskapinum, har øll eftirspurn og alt framboð eru løgd saman í ávikavist heildareftirspurn *(AD, aggregate demand)* og heildarframboð *(AS, aggregate supply)*. Í tí myndlinum ber saktans til at lýsa hvussu tað almenna hevur árin á búskapin sum heild, og at lýsa hvussu búskapurin allur háttar sær ígjøgnum sveiggj í búskapinum. Í hesum føri er kortini meira upplýsandi at greina fíggjarpolitisk átøk í tvígeira myndlinum, tí vit eru ikki bara áhugað í hvussu virkin fíggjarpolitikkur samanlagt er, men eru í meira mun áhugað í hvørji árin hann hevur á javnvágina millum vardu vinnurnar (Heimamarknaðin) og vinnur í altjóða kapping (Gjaldoyravinnumarknaðin).

## 7.1 Aftursveiggj - negativur stoytur

Negativi stoyturin kemur í hesum myndlinum uttaneftir, antin sum prísfall ella sum afturgongd í nøgdum[37].

[37] Munur kann í roynd og veru vera á um afturgongdin stendst av prísfalli ella afturgongd í nøgd. Í hesari gjøgnumgongd verður í myndlinum hvørja ferð brúkt samstundis stoytur á prísirnar og nøgdirnar, eins og til dømis í 1990 árunum. Onnur dømi um minking í nøgd eru m.a. sjúka í alifiski sum í 2003-2004, útistongsul av fiskileiðum sum í 1977, ella afturgongd í botnfiskastovnum sum í 2008-2010.

Hendingin í Mynd 5 er ein negativur stoytur, tá bæði minkandi prísir á heimsmarknaðinum og minkandi nøgdir av fiski elva fallandi úrtøku úr framleiðsluni og minkandi inntøkur í útflutningsvinnum. Slík var støðan frá 1977 at rokna og nøkur ár framm. Er talan um nøgdarminking, verða avleiðingar fyri arbeiðsfjøldina í vinnuni, men minka prísirnir hendir einki við arbeiðsfjøldini.




(a) Tilfeingisvinnurnar




(b) Heimamarknaðurin

Mynd 5: Negativur stoytur á tilfeingisvinnuna við fallandi prísum og minkandi nøgdum (5a), elvir minkandi eftirspurn á heimamarknaðinum við lægri prísum og minni virksemi (5b), her víst við møguligum fíggjarpolitiskum inntrivi.

Í Mynd 5 eru stoytirnir externir - tað vil siga at teir eru ikki elvdir av búskapinum sjálvum, men koma uttaneftir. Stoyturin kann vera komin av at tilfeingisgrundarlagið skeiklast[38] ella at broytingar eru á altjóða marknaðum[39].

Í fyrstu atløgu er einki, sum stjórnin kann gera við at inntøkurnar minka, tí eingi amboð eru til tess. Her er einki gjaldoyra sum gevur seg, og her er eingin pengapolitiskur myndugleiki til at stýra millum skerini við pengapolitikki, við gjaldoyravirði ella rentu sum stavnhaldi. Týðandi boðskapurin í hesum myndlinum er at við sjálvan upprunan til aftursveiggið fær ongin gjørt nakað. Stjórnin má bíða eftir næsta stigi, sum er minkandi eftirspurnin á heimamarknaðinum, áðrenn hon kann gera nakað við støðuna. Minkaðu inntøkurnar elva

[38]Fiskimarkini flutt út seinna part av 1970 árunum, fiskaloysi í 1986 og 1992, vaxandi fiskastovnar í 1998, sjúka í alifiskinum í 2003 og 2004, uppsjóvarfiskurin í 2010 eru nøkur dømi.

[39]Sum t.d. prísfalliðá hvítum fiski 2008-2009, og hinvegin prísvøxturin á laxi 2012-2017

minni eftirspurn á heimamarknaðinum, sum síðani elvir vøxtur í arbeiðsloysinum, sum aftur elvir minkandi eftirspurn, eins og Keynski multiplikatorurin fyriskrivar. Vit enda tá í javnvágini B, við minni virksemi og øktum vinnuloysi og við lægri prísum enn í A.

Vinnuloysið er nú bæði í útflutningsvinnunum og í vardu vinnunum.

Til at steðga vøxtrinum í arbeiðsloysi, kann stjórnin seta tiltøk í verk sum økja eftirspurnina, so sum at økja beinleiðis almennt virksemi og íløgur, at minka um skattin til at skunda undir einstaklinganýtsluna og íløgurnar hjá einstaklingum og fyritøkum. Sambært myndlinum ber tá til at koma aftur til javnvágina í A. Men almenna átakið hevur tó ongi árin á arbeiðsloysið í útflutningsvinnunum, uttan so at tað almenna trýstir eftirspurnina í vardu vinnunum longur upp, enn hon frammanundan var, og vit høvdu komið til javnvágina C. Við hesum fylgja hægri prísir og flyting av arbeiðsfólki úr útflutningsvinnunum yvir í vinnurnar á heimamarknaðinum.

Í myndilin er eingin arbeiðsmarknaður tikin uppí, men um lønartillaging skuldi verið íroknað, so hevði javnvágin C elvt vaxandi lønir, og tí eisini eina flyting av framboðsstrikuni á heimamarknaðinum til vinstru, við hægri prísum og minni framleiðslu. Óvist er um hækkaðu lønirnar høvdu havt árin á framleiðsluna hjá tilfeingisvinnunum, men var nøkur týðandi ídnaðarvinna í altjóða kapping, so hevði upp farna lønarlagið havt darvandi árin á ídnaðarútflutningin og á kappingina við innfluttar vørur og tænastur.

Niðurstøðan er tí at myndugleikarnir kunnu beinleiðis og umvegis økja eftirspurnina og tessvegna virksemið á heimamarknaðinum, men teir hava ongi árin á minkaða virksemið í útflutningsvinnunum. Royndir at viga upp ímóti minkingini í útflutningsvinnunum elva prís og lønarvøxtur, sum kunnu koma fiskavirkjum aftur um brekkur[40]. Royndirnar at byrgja fyri stórum afturstigi hava mangan tókst tí almenna møtumikið, tí at áognin mangan er ódrúgv og lán uttanlands einasta bjargingin. Tá veldst um skuldarstøðuna fyri at fremja støðuleikan í búskapinum, eins og í 1990 árunum.

[40]Eftir stendur kortini ein munagóð eftirkanning av hvørt fiskavirkini og alivirkini eru serliga viðbrekin fyri lønarhækkingum. Fyribils verður í hesum myndlinum gingið út frá at lønarlagið hevur lítla ávirkan á fiskavirkingina, tí ilt hevur verið at finna tíðarskeið har fiskavirkingin er minkað av lønarávum.

## 7.2 Framsveiggj - positivur stoytur

Sum víst í Mynd 6, kann stoyturin eisini vera positivur við vaxandi prísum ella vaxnum rávørugrundarlag, eins og støðan hevur verið síðani 2010. Støðan er nett tann sama á tann hátt, at stjórnin røkkur ikki við fíggjarpolitikki at vika øktu inntøkurnar og økta virksemið í tilfeingisvinnunum. Annað stig er, eins og frammanundan, at framsveiggið smittar inn í vardu heimamarknaðarvinnurnar, so at her eisini kemur framsveiggj við hægri prísum og vaxandi eftirspurn eftir arbeiðsfólki.




(a) Tilfeingisvinnurnar




(b) Heimamarknaðurin

Mynd 6: Positivur stoytur á tilfeingisvinnuna við vaxandi prísum og vaxandi nøgdum (6a), elvir økta eftirspurn á heimamarknaðinum við hægri prísum og meira virksemi (6b), her víst við møguligum fíggjarpolitiskum inntrivi.

Vit kunnu hugsa okkum hesi seinastu 10 árini við øktu uppsjóvarvinnuni og vøxtri í alivinnuni sum dømi um drúgt frammsveiggj. Vaxandi eftirspurnin ger meira framleiðsla skal til at nøkta eftirspurnina, so at prísir og fastognarvirði verða trýst uppeftir.

Hetta er tað sum mangan verður nevnt ”ovurheitur búskapur”, og tá halda summi at vandi kann vera fyri versnandi kappingarføri. Men í okkara føri vendir kausaliteturin beint øvut: tað er júst betri "kappingaføri" (ella rættari: vaxin útflutningur) sum hevur sett ferð á búskapin. Betri prísir ella størri útflutt nøgd hava elvt sjálvt frammsveiggið í útflutningsvinnunum. Avleidda frammsveiggið á heimamarknaðinum er elvt av tí vaxandi eftirspurn, sum stavar

frá stoytinum, sum komin er uttaneftir.

Av tí at arbeiðsmarknaðurin ikki er nágreindur í myndlinum, sæst ikki týðuliga hvat hendir við lønarlagnum, men større eftirspurn eftir arbeiðsfólki og hægri prísir áttu í minsta lagi at elvt hægri heldur enn lægri lønarlag. Í slíkari støðu veldst meira um hvørt stoyturin í veruleikanum er varandi broyting, heldur enn bráðfeingis frammsveiggj.

Er positivi stoyturin varandi, kemur sum frá líður trýst á arbeiðsmarknaðin, eins og upptrýst eisini verður á lønirnar. Vaxandi lønarlag í einum landi við støðugt stórum avlopum á gjaldsjavnanum vegna lutfallsliga stórar gjaldoyragávur, átti ikki at undra nakran. Er talan um varandi broyting, eiga lønirnar at vaxa, og avleidda minkingin av verkafólki í útflutningi er púra náturligt úrslit av at gjaldoyrafamleiðslan er vaxin munandi. Avleiðingin av batnaða produktivitetinum í útflutningsvinnunum elvir flyting av arbeiðsfólki yvir í heimamarknaðarvinnurnar. Hvønn veg lønarlagið fer, er kanska ikki heilt vist, men lægri verður tað helst ikki.

Varir positivi stoyturin stutt, er avleiðingin á prísirnar bert bráðfeingis, so at valla nøkur ávirkan verður á lønarlagið.

Um stjórnin í slíkum førum táttar fíggjarpolitikkin við hægri skattum, minni almennum rakstri og færri íløgum, fyri at minka um virksemið, fær tað bara árin á virksemið og á lønarlagið á heimamarknaðinum. Til at náa javnvág á heimamarknaðinum, eru fíggjarpolitisk átøk til at koma aftur á javnvágina í A nóg mikið. Ætlar stjórnin at taka alt trýstið av búskapinum, má táttast so mikið meira á heimamarknaðinum, at vit røkka javnvágini í C. Her skal kortini viðmerkjast at fíggjarpolitiska tátting hava vit ikki merkt nógv til í Føroyum. Tí verður hetta mestsum eitt *"akademist øvilsi"* til at vísa hvussu myndilin í prinsippinum virkar. Sum Mynd A.1 í ískoytinum 10 vísir, hevur fíggjarpolitikkurin mest at kalla verið viðrekandi, tí roynveruligu útreiðslurnar[41] hjá tí almenna í stóran mun vendir sama veg sum broytingin í løntakaratalinum. Tess meira virksemi, tess størri útreiðslur og virksemi hjá tí almenna.

[41]Í hesum føri eru roynveruligu útreiðslurnar roknaðar sum útreiðslurnar í navnavirði prísviðgjørdar við lønargongdini í sáttmálanum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Tálmandi fíggjarpolitikkur hevur greiðar avleiðingar fyri býtið av inntøkum og ríkidømi millum tey í hvør sínum geira í Mynd 6. Uttan fíggjarpolitiska tátting økjast fíggjarognir og inntøkur í báðum geirum, hóast royndirnar eru at vøxturin er meira í tilfeingisgeiranum. Men táttar stjórnin fíggjarpolitikkin, minka inntøkurnar í vardu vinnunum á heimamarknaðinum, sum tí økir um skeiva býtið av inntøkum.

Framsveiggið í føroyska búskapinum síðan 2010 er komið frá vaxandi útflutningi og tí eisini inntøkum úr alivinnuni og úr uppsjóvarfiskivinnuni. Nógv vaxnu inntøkurnar haðani elva størri eftirspurn eftir vørum og tænastum frá vardu vinnunum[42]. Í hesum seinna føri er vert at leggja sær í geyma upprunan til framsveiggið. Tað er ikki bara íkomið av at marginali produktiviteturin brádliga er farin so risa nógv upp. Tað er íkomið av tveimum øðrum ávum. Í fyrra lagi eru nøgdirnar vaxnar nógv og prísirnir á fleiri fiskasløgum farin munandi upp[43]. Produktiviteturin kann saktans vera farin upp, tá uppsjóvarflotin vax í mun til heimaflotan, tí at tann fiskiskapurin møguliga er meira produktivur, men tað er vøxturin í atkomuligum tilfeingi sum er upprunin.

Hesi kelduni til framsveiggj í búskapinum kann fíggjarpolitikkurin sum nú er ikki røkka[44]. Landsstýri og Løgting kunnu økja skattirnar og avgjøldini so mikið teimum lystir, men tað hevur ongi árin á vaxandi inntøkurnar í útflutningsvinnunum, og trýstið á búskapin heldur tí framm ótarnað, hóast tálmandi fíggjarpolitikkin. Um roynt kortini var við tálmandi fíggjarpolitikki, hevði tað havt størri árin á inntøkubýtið í landinum enn á framsveiggið sjálvt.

Lótu almennu myndugleikarnir standa til, øktist eftirspurnin eftir úrtøkuni hjá vardu vinnunum, og prísirnir høvdu farið upp. Stendur framsveiggið við nóg leingi, hevur tað í miðal langa sýninum fingið árin á lønarlagið, sum tí eisini fer upp. Tað hevði havt við sær eina ávísa afturgongd í framboðnum hjá vardu vinnunum, meðan príslagið støkkur nakað

[42]Eftirspurnin eftir innflutningi vexur eisini, og tað hevur vaxandi útflutningurin eisini givið rúm fyri á handilsjavnanum.

[43]Vigað miðal eindarvirði av laxaúrdráttum í útflutninginum er nærum tvífaldað eftir 10 ár, og 10 ára miðal eindarvirðisvísitalið er 74 prosent hægri enn undandfarnu 10 árini. Roknað á sama hátt vóru eindarvirðini á uppsjóvarfiski 49 prosent hægri. Nøgdirnar av uppsjóvarfiski vóru fýra ferðir størri seinastu 10 árini, í mun til tey 10 árini undan teimum, meðan nøgdirnar av laxi vóru tvífaldaðar.

[44]Tá fammsveiggj í størri ídnaðarlondum koma av at heimlendska nýtslan er uppfarin av onkrum ávum, ber til hjá stjórnini at tátta fíggjarpolitikkin, so at keldan til frammsveiggið verður køvd.

aftrat uppeftir.

Tálmandi fíggjarpolitikkur hevur í hesum myndlinum tí tey árin, at prís- og lønarlagið í vardu vinnunum verður lægri enn annars hevði verið. Roynveruligu inntøkurnar *(real income)* í vardu vinnunum verða lægri, meðan realu inntøkurnar í útflutningsvinnunum verða uppaftur hægri, av tí at prísirnir á vardu tænastunum vera lægri enn annars hevði verið.

Gongdin er tí vaxandi misjavni í inntøkubýtinum. Stór gjaldsjavnaavlop og vøxtur í privatari nettoogn uttanlands eru tekin um ójavnt skiftið av fíggjarogn.

Vert er her at dvølja við munin millum føroyska og danska búskapin. Í ídnaðarlandinum verður serstakliga neyvt hugt at stoyti í innlendska búskapinum, sum kann fáa árin á útflutningsvinnurnar. Beint øvut er í Føroyum, har stoyturin rennur úr útflutningsvinnunum og inn í búskapin, tí Føroyar útflyta rávøru ella lítið góðskaða vøru úr náttúrutilfeingi, og ikki ídnaðarvørur í kapping um produktivitet.

# 8 Inntøkubýtið og makrobúskaparligu avleiðingarnar

Tilfeingisrentan í Føroyum er heilt avgerandi fyri gongdina í samfelagsbúskapinum, bæði fyri vælferðina alla samanlagda, og ikki minni fyri býtið av vælferðini.

Nógv eru tey, sum øvunda Noregi inntøkurnar úr tilfeingisrentuni frá oljuvinnuni. Olja er ikki endurnýggjandi tilfeingi, og tilfeingisrentan verður tí spard upp í grunn, mestsum fyri at gera úrtøkuna endurnýggjandi fyri norsku borgararnar í allar ævir. Slíkt er ikki neyðugt, tá talan er um endurnýggjandi tilfeingi, tí eins og heitið sigur, verður nýtt tilfeingi sett við á hvørjum ári. Skógur og fiskastovnar eru endurnýggjandi tilfeingi, sum til ber at heysta av hvørt ár, um tilgongdin í minsta lagi svarar til úrtøkuna.

Sambært Regjering (2020)] brúkti Noreg frá 1970 til 2001 í miðal eina upphædd sum svarar til 3,4 prosent av BTÚ úr oljugrunninum[45]. Árini frá 2001 til 2019 svaraði nýtslan í miðal til 4,4 prosent av BTÚ, men sannlíkt hevur nýtslan onkur ár verið heilt upp móti 9 ella 10 prosentum av BTÚ.

[45] Statens Pensjonsfond Utland, SPU

Hugsa vit okkum at Løgtingið tók alla tilfeingisrentuna úr aling og fiskiskapi til høldar saman við ríkisveitingini, var sannlíkt ein upphædd sum svarar til um leið 15 prosent av BTÚ til taks hjá Fíggjarmálaráðnum á hvørjum ári. So stór eru tilfeingisríkidømi og potensielt varandi gjaldoyragáva Føroya í mun til tilsvarandi upphæddir í Noreg, at tey púra greitt eru grundarlag undir stórari vælferð, og at tey hava samfelagslig og makrobúskaparlig árin.

At tilfeingisrentan eisini hevur árin á inntøkubýtið, verður greitt ávíst í framúr góðu greiningini í Jón Joensen (2019) við rámandi undirheitinum "Øll fáa meiri, flest fáa minni". Ein av niðurstøðunum er, at hóast samfelagið alt er vorðið ríkari, so er nývunna ríkidømið savnað á alt færri hondum. Serstakliga eru tað tey fáu í ríkasta túsundapartinum av skattgjaldarum, sum hava fingið størri part av samfelagsliga ríkidøminum. Greiningin vísir broytingina í tí parti av netto inntøku, hvør inntøkubólkur hevur fingið, í mun til býtið sum tað var í 2009.

Her eru tveir eginleikar við tilfeingisinntøkum Føroya lands, sum hava makrobúskaparligar avleiðingar. Í fyrra lagi er miðal árliga úrtøkan úr tilfeinginum (tilfeingisrentan) hin lutfallsliga mesta í norðurlondum, og í øðrum lagi er hon so skeivt býtt millum borgararnar, at hetta fær árin á allan búskapin sum heild og serstakliga á gjaldsjavnan.

Av tí at tilfeingisrentan í so lítlan mun kemur til nýtslu, endar hon sum meirinntøka hjá fyritøkunum í fiskiveiði og aling. Sum fyritøkurnar býta hesar risastórðu inntøkur, enda tær sum einstaklingaogn á so fáum hondum innanlands og uttanlands, at tær í bara heilt lítlan mun enda í føroysku nýtsluni og sum økt vælferð. Hetta man vera mesta orsøkin til at so óvanliga stór avlop hava verið á gjaldsjavna Føroya hesi seinastu mongu árini, at ogn uttanlands hjá privata geiranum má vera vaxin við risafetum.

Varandi hall á rakstrarviðskiftum gjaldsjavnans er í veruleikanum lántøka uttanlands, og er tekin um samfelagsbúskaparligan ójavna, sum neyðugt er at rætta, tí vælferð fer til spillis hjá teimum, sum gjalda skulu lántøkuna aftur. Varandi avlop er í so máta útlán til umheimin, og tí mist vælferð hjá teimum sum ikki tóku inntøkuna til nýtslu. Onki bilar við at avlop ella hall er einstøk ella fá ár. Men tá so lutfallsliga stór avlop eru í mong ár á rað, og

tá orsøkin er kendur vaxandi ójavni í inntøkubýtinum, er rættast at umhugsa hvat ið gerast skal við málið.

Tók stjórnin tilfeingisinntøkuna til høldar, hevði meginparturin farið til økta vælferð í nýtslu. Nýtslan av vørum og tænastum av bæði heimamarknaði og av innflutningi hevði tá vaxið, og javni hevði sum frá leið aftur komið á rakstrarviðskiftini við umheimin.

Vert er at leggja sær í geyma, at tá bæði varandi gjaldsjavnaavlop og upptrýst er á lønarlagið í tilfeingisríka pinkulandinum, er ikki talan um at kappingarførið kemur í váða, men tvørtur ímóti er hetta tekin um, at lønirnar á heimamarknaðinum eru ov lágar, heldur enn ov høgar. Varandi avlop mótvegis umheiminum er tekin til samfelagið um, at framleitt verður meira av gjaldoyra, enn brúkarin við verandi inntøkubýti hevur í hyggju at innflyta fyri. Til at fáa flutt framleiðsluorku yvir í heimamarknaðin, mugu lønir og avkast á heimamarknaðinum vaxa í mun til lønir og avkast í tilfeingisvinnunum.

Framman undan er her staðfest at úrtøkan av landsins tilfeingi er ogn Føroya fólks, og eigur sjálvandi at koma borgarunum til góða. Slíkt átti sjálvsagt at verðið framt í spekt og sóma. Verður tað ikki framt fyri rættvísis sakir, kann tað fara at henda av neyð. Sum Búskaparráðið fleiri ferðir hevur víst á[46], fara krøvini til fígging av almennu tænastunum at koma undir trýst. Talið av skattgjaldarum fer at minka, so at fígging ikki er til vaxandi útreiðslurnar, sum eitt nú standast av vaxandi ellisbyrðuni.

Longu nú eru allir politiskir flokkar samdir um at neyðugt er at taka gjøld inn frá fyritøkunum í aling og fiskiskapi. Hesi gjøld munnu fara at vaxa munandi, um hitt almenna skal fáa endarnar at røkka saman sum frá líður. Farnu 15 árini eru skattgjaldararnir fækkaðir 1,5 prosent, men komandi 15 árini fara teir sambært forsagnunum at minka meira enn tvífalt, 3,7 prosent. Um somu tíð vaxa heilsuútreiðslur og útreiðslur av ellisrøkt munandi, tí talið av gomlum í samfelagnum fer at vaxa munandi í mun til talið av skattgjaldarum.

[46]Sjá millum annað frágreiðingarnar Búskaparráðið 2019, Búskaparráðið 2017 og Búskaparráðið 2015

# 9 Støðufestigrunnur

Olja og gass niðanjarðar eru náttúrutilfeingi sum tømast so hvørt brúkt verður av teimum. Í Føroyum er hinvegin talan um endurnýggjandi tilfeingi[47] í fiskastovnum og alifirðum, sum ikki við kendari vissu nakrantíð verða uppi. So leingi brúki av tilfeinginum er minni enn árligi tilvøxturin, og so leingi dálkingin ikki er størri enn upptøkuevnini í náttúruni, verða tilfeingini til varandi gagn. Tey kunnu tí roknast sum varandi inntøkukeldur av heilt øðrum slagi enn tømiligar keldur av tilfeingi.

Fiskastovnar, skógur, búnaðarjørð og eftirspurd náttúra av øðrum slagi[48], eru dømi um varandi tilfeingi, sum framhaldandi kasta virði av sær, um nýtslan er minni enn nátúrliga endurnýggingin.

Tá Noreg fór undir at tøma sínar orkukeldur niðanjarðar, átók ríkið sær ábyrgdina fyri øllum komandi ættarliðum, til at varðveita tiknu virðini av tilfeingisrentu til allar íbúgvar, livandi sum óføddar. Tí verður øll tikna tilfeingisrentan sett í fíggjargrunnar til at geva varandi íkast til norska samfelagið.

Slík sparing er ikki á sama hátt neyðug, tá talan er um varandi tilfeingi, tí tá veitir náttúran av sær sjálvari varandi árligu úrtøkuna. Verða alifirðir og fiskastovnar væl ansað og skilagott umsitin av samfelagnum, verður úrtøkan varandi, hóast hon av ymsum ávum kann vera ymisk frá ári til árs. Hesi frávik í úrtøku kann samfelagið tryggja seg ímóti við sparing í støðufestisgrunn[49].

Vóru lánimøguleikarnir óavmarkaðir, var eingin orsøk til at hava slíkan grunn. Rætt er at tilfeingisgrundarlagið er varandi, og tí er eingin orsøk til at fylla upp í ein ríkisgrunn til at býta avkastið til øll komandi ættarlið av borgarum. Men nøgdin av tilfeingi er ymisk frá ári til árs, tí bæði prísir og tilfeingi sjálvt variera. Størri sveiggj kunnu koma fyri av til dømis

[47] Onki uttan sólarorka, vindorka, alduorka og tílík eru av sonnum ævigar náttúrukeldur, meðan skógur og fiskastovnar til dømis eru varandi um tey ikki verða trároynd (depleted) so at tilfeingið hvørvur

[48] Stór eftirspurn er eftir náttúru til frítíðarbrúk, men eisini til varðveitslu av burturkasti, til bygging, ella aðra vinnuliga nýtslu, eins og firðir eru eftirspurdir sum aliøki til ymisk sløg av úrtøku, og hagin til frítíðarbrúk ella beiti o.s.fr.

[49] Sjá m.a. Ploeg (2018) og meira teoretiskt í Hartwick (1977) og R. M. Solow (1974)

umhvørvisárinum, av heimspolitiskum ávum, ella trygdarávum av onkrum slag.

Mest avgerandi er kortini, at ein ríkur grunnur til temja sveiggini kann geva stjórnini neyðugu stundirnar og neyðuga rásarúmið, til at meta um hvørt stoytirnir móti búskapinum (hvørt teir so eru positivir ella negativir) eru varandi ella bráðfeingis, og til at hava nóg stóra ávirkan á gongdina.

# 10 Niðurstøður

Sveiggini í føroyskum búskapi koma í størri mun uttaneftir, heldur enn úr búskapinum sjálvum. Stoytirnir koma úr tilfeinginum sjálvum og av altjóða marknaðum. Umframt ta virðisøking av útflutningsvørunum, sum arbeiði og kapitalur kasta av sær, telur tilfeingisrenta ein heilt stóran part av gjaldoyrainntøkunum. Tí hevur lønarkappingarførið hjá fyritøkunum í útflutningsvinnu ikki avgerandi týdning fyri búskaparsveiggini. Oman á tilfeingisrentuna koma einvegis veitingar úr Danmark sum gjaldoyragáva inn í búskapin.

Sjálv hin lutfallsliga støddin á potensielt varandi gjaldoyragávuni, um leið 15 prosent av BTÚ, er orsøk til umhugsan og ansni, tí so stórar upphæddir hava sjálvandi makrobúskaparligar avleiðingar, sum á onkran hátt mugu handfarast.

*Tillaging til og umsiting av gjaldoyragávuni er tí mest avgerandi búskaparmálið; ikki kappingarførið hjá útflutningsfyritøkum.*

Búskaparsveiggini koma sostatt frá tilfeingisrentuni sjálvari. Ríkisveitingin er støðug, og elvir ikki sveiggj. Virðisøkingin hjá manning og virkiseigarum sveiggjar heldur ikki nevnivert, og tí er tað gjaldoyravirðið av tilfeinginum sjálvum sum ber sveiggini inn í búskapin.

Ilt er at meta nær sveiggj í prísum á fiski og í nøgdum av fiski eru varandi ella bráðfeingis. Hvørt rætt er at seta í verk fíggjarpolitisk átøk, er ikki evni í hesum ritinum. Heldur eru ørindini at gera vart við at stoytirnir koma uttaneftir og at avgerandi munin á varandi broytingum og bráðfeingis sveiggjum.

Eru broytingarnar varandi, er uppgávan at lata búskapin laga seg til nýggju viðurskiftini.

Eru virðini á gjaldoyragávunum farin varandi upp, má framleiðsluorka sleppa at flyta úr útflutningsvinnum (gjaldoyraframleiðslu) og yvir í heimamarknaðin. Hetta gerst bara við at geva framleiðsluorkuni í heimamarknaði, arbeiðsfjøld og kapitali, betri relativt avkast av íkasti sínum. At seta tiltøk í verk fyri kappingarføris sakir, er nyttuleyst og darvar neyðugu tillagingini.

Eru virðini hinvegis bara bráðfeingis uppfarin, kann stjórnin leggja upp í við tálmandi fíggjarpolitikki, til at forða fyri tí tillaging, sum tá kemur av sær sjálvari, um til dømis bráðfeingis framsveiggj stendur leingi við. Við einum støðufestigrunni ber nógv betur til at javna sveiggini frá tilfeingisvinnunum, tí illa ber til at seta álitið á at Løgtingið sparir í góðum tíðum, til at standa ímóti við í verri tíðum.

Vegna tess at tað er so torført og drúgført at avgera um broytingar eru varandi ella bráðfeingis, er neyðugt at hava fíggjarpolitiskt rásarúm til at handfara støðuna. Og tað gerst best av øllum við at taka tilfeingisrentuna til høldar sum almenna inntøku, og síðani at brúka hana sum javnt íkast til búskapin. Savnað upp í ein grunn undir ræði hjá Løgtinginum, ber til at javna tilgongdina av tilfeingisrentu í búskapin, og sostatt sleppa undan fíggjarpolitisku avbjóðingini uttaneftir.

Valla sleppst kortini heilt undan sveiggjum í búskapinum, men tey høvdu verið munandi minni, um øll gjaldoyragávan – bæði ríkisveiting og tilfeingisrentan – upp á eini 15 prosent av BTÚ, varð goldin í jøvnum streymi inn í búskapin.

# Heimildir


Armstrong, Harvey and Robert Read (Jan. 2002). "Small States, Islands and Small States that are also Islands". In: *Studies in Regional Science* 33, pp. 237–260.

Armstrong, Harvey W. and Robert Read (2003). "The determinants of economic growth in small states". In: *The Round Table* 92.368, pp. 99–124.

Asche, F., T. Bjorndal, and D. V. Gordon (Mar. 2009). "Resource Rent in Individual Quota Fisheries". In: *Land Economics* 85.2, pp. 279–291.

Asche, Frank, James L Anderson, and Taryn M Garlock (2018). "Food from the water–fisheries and aquaculture". In: *The Routledge Handbook of Agricultural Economics*. Ed. by G.L. Cramer, K.P. Paudel, and A. Schmitz. Routledge International Handbooks. Taylor and Francis.

Autrup, Søren L. (Sept. 2015). "Aktuelle tendenser i færøsk økonomi". In: *Kvartalsoversigt 3. kvartal 2015*.

Bjorndal, Trond and Gordon Munro (2012). *The Economics and Management of World Fisheries*. OUP Catalogue 9780199576753. Oxford University Press.

Blanchard, Oliver J. (1997). "The Medium Run". In: *Brookings Papers on Economic Activity* 28.2, pp. 89–158.

Briguglio, Lino (1995). "Small island developing states and their economic vulnerabilities". In: *World Development* 23.9, pp. 1615–1632.

Briguglio, Lino, Gordon Cordina, Nadia Farrugia, and Stephanie Vella (Sept. 2009). "Economic Vulnerability and Resilience: Concepts and Measurements". In: *Oxford Development Studies* 37, pp. 229–247.

Búskaparráðið (2001). *Kappingarføri og tillaging til broytt viðskifti við umheimin*. Economic report. Economic Council of the Faroe Islands.

— (2002). *Ein nýggj tilgongd til lýsingar av føroyska búskapinum*. Economic report. Economic Council of the Faroe Islands.

— (2014). *Búskaparrenta og tilfeingisrenta íføroyska búskapinum*. Economic report. Economic Council of the Faroe Islands.

— (2015). *Fíggjarliga haldføruið hjá almenna geiranum*. Economic report. Economic Council.

— (2017). *Fíggjarpolitiskt haldføri*. Economic report. Economic Council.

— (2019). *Demografiski drátturin og avleiðingarnar fyri búskapin*. Economic report. Economic Council.

Cárcamo, Rodrigo and Janvier. D. Nkurunziza (2020). *Do Differences in the Types of Commodities Exported Matter for Export Concentration?* United Nations. 38 pp.

Corden, W. Max and J. Peter Neary (Dec. 1982). "Booming Sector and De-Industrialisation in a Small Open Economy". In: *The Economic Journal* 92.368, pp. 825–848.

Daníelsson, Ásgeir (2002). "Biological Information, Profitability of Fisheries and Lease and Asset Prices for ITQs in Iceland". In: (Wellington New Zealand). International Institute of Fisheries Economics and Trade (IIFET).

Easterly, William and Aart Kraay (Nov. 2000). "Small States, Small Problems? Income, Growth, and Volatility in Small States". In: *World Development* 28.11, pp. 2013–2027.

Farrugia, Charles (1993). "The special working environment of senior administrators in small states". In: *World Development* 21.2, pp. 221–226.

Gordon, H. Scott (1954). “The Economic Theory of a Common-Property Resource: The Fishery”. In: *Journal of Political Economy* 62.2, pp. 124–142.

Gunnlaugsson, Stefan B., Hörður Saevaldsson, Dadi M. Kristofersson, and Sveinn Agnarsson (Apr. 2020). “Resource Rent and its Distribution in Iceland’s Fisheries”. In: *Marine Resource Economics* 35.2, pp. 113–135.

Gylfason, Þorvaldur, Tryggvi Thor Herbertsson, and Gylfi Zoega (1999). “A MIXED BLESSING: Natural Resources and Economic Growth”. In: *Macroeconomic Dynamics* 3.2, pp. 204–225.

Hannesson, Rögnvaldur (2017). “Fish Quota Prices in Norway”. In: *Marine Resource Economics* 32.1, pp. 109–117.

Hartwick, John M. (1977). “Intergenerational Equity and the Investing of Rents from Exhaustible Resources”. In: *The American Economic Review* 67.5, pp. 972–974.

Imam, Patrick (Nov. 2008). “Rapid Current Account Adjustments: Are Microstates Different?” In: *IMF Working Papers* 08.

IMF (Feb. 2013). “Macroeconomic Issues in Small States and Implications for Fund Engagement”. In: *Policy Papers* 2013.8.

Jansen, M. (2004). “Income Volatility in Small and Developing Economies: Export Concentration Matters”. In: WTO discussion papers.

Jón Joensen (2019). *Inntøkubýtið 2009-2017, Øll fáa meira, flest fáa minni.*

Krugman, Paul R. (1987). “The narrow moving band, the Dutch disease, and the competitive consequences of Mrs. Thatcher: Notes on trade in the presence of dynamic scale economies”. In: *Journal of Development Economics* 27.1, pp. 41–55.

Larsen, Arne (1998). *Beretning om den økonomiske udvikling på Færøerne 1997/98.* Tech. rep.

— (1999). *Beretning om den økonomiske udvikling på Færøerne 1998/99.* Tech. rep.

Malthe-Thagaard, Sune (Sept. 2017). “Højkonjunktur og pres på arbejdsmarkedet”. In: *Kvartalsoversigt 3. kvartal 2017.*

Malthe-Thagaard, Sune and Flora Nagy (2019). “Arbejdsmarkedet presset af meget lav ledighed”. In: *Analyse - Færøsk økonomi.*

Matsuyama, Kiminori (1992). “Agricultural productivity, comparative advantage, and economic growth”. In: *Journal of Economic Theory* 58.2, pp. 317–334.

Matthíasson, Thórólfur (2012). “ITQs in a Rough Water”. In: International Institute of Fisheries Economics and Trade.

Nationalbank, Danmarks (Sept. 2016). “Aktuelle tendenser i færøsk økonomi”. In: *Kvartalsoversigt 3. kvartal 2016.*

Nationalbanken (Nov. 2018). “Øget pres på arbejdsmarkedet”. In: *Analyse - Færøsk økonomi.*

Norman, Victor D. (1986). *En liten åpen økonomi.* Oslo: Universitetsforlaget AS.

Ploeg, Rick van der (2018). “Three funds for managing natural resource wealth”. In: *Rethinking the Macroeconomics of Resource-Rich Countries.* Ed. by Rabah Arezki, Raouf Boucekkine, Jeffrey Frankel, Mohammed Laksaci, and Rick van der Ploeg. Centre for Economic Policy Research. Chap. 9, pp. 97–102.

Regjering, Norges (2020). *Hvor mye oljepenger bruker vi?* Https://www.regjeringen.no/no/tema/okonomi-og-budsjett/norsk_okonomi/bruk-av-oljepenger-/hvor-mye-oljepenger-bruker-vi/id450461. (Visited on 12/15/2020).

Rødseth, Asbjørn (Sept. 2000). *Open Economy Macroeconomics.* Cambridge University Press.

Røisland, Øistein and Ragnar Torvik (2004). "Exchange rate versus inflation targeting: a theory of output fluctuations in traded and non-traded sectors". In: *The Journal of International Trade & Economic Development* 13.3, pp. 265–285.

Sachs, Jeffrey D and Andrew M Warner (Dec. 1995). *Natural Resource Abundance and Economic Growth*. Working Paper 5398. National Bureau of Economic Research.

Skak-Nielsen, N. V. (1987). *Den økonomiske udvikling på Færøerne 1986*. Tech. rep.

Solow, R. M. (1974). "Intergenerational Equity and Exhaustible Resources12". In: *The Review of Economic Studies* 41.5, pp. 29–45.

Solow, Robert M. (Mar. 2000). "Toward a Macroeconomics of the Medium Run". In: *Journal of Economic Perspectives* 14.1, pp. 151–158.

Torvik, Ragnar (2001). "Learning by doing and the Dutch disease". In: *European Economic Review* 45.2, pp. 285–306.

— (2018). "Oil prices and the exchange rate: Optimal monetary policy for oil exporting countries". In: *Rethinking the Macroeconomics of Resource-Rich Countries*. Ed. by Rabah Arezki, Raouf Boucekkine, Jeffrey Frankel, Mohammed Laksaci, and Rick van der Ploeg. Centre for Economic Policy Research. Chap. 6, pp. 65–74.

Wilen, James E. (May 2000). "Renewable Resource Economists and Policy: What Differences Have We Made?" In: *Journal of Environmental Economics and Management* 39.3, pp. 306–327.

Þórhallsson, Baldur (Jan. 2010). "The Icelandic Crash and its Consequences: A Small State without Economic and Political Shelter". In: *Small states in Europe: Challenges and opportunities*. Ed. by R. Steinmetz Anders Wivel. Ashgate. Chap. 13.

— (Aug. 2011). *The Icelandic economic collapse: Incompetence or the small size?* Lecture Note. Faculty of Political Science at the University of Iceland.

# Talvur

Talva A.1: Kvotaprísur í mun til avreiðingarprís, Ísland 2020

| Fiskaslag | Kvotaprísur[a] | Avreiðingarprísur | Prosent |
|---|---|---|---|
| Toskur | 249,04 | 290,99 | 86 % |
| Hýsa | 213,24 | 268,71 | 79 % |
| Upsi | 15,70 | 91,69 | 17 % |
| Makrelur | 25,27 | 58,27 | 43 % |
| Sild | 31,89 | 45,29 | 70 % |

[a] Hagtøl í íslendskum krónum frá Fiskistofa (http://www.fiskistofa.is/veidar/aflaheimildir/aflamarksvidskipti) og frá Verðlagsstofa (http://verdlagsstofa.is/index.php/fiskvere/manaearlegt) galdandi januar til novembur 2020, tikin 12.januar 2021. Útrokningar eru høvundans. Taldir uppí eru allir kvotahandlar millum skip, har prísurin var meiri enn null krónur.

Talva A.2: Kvotaprísir í mun til avreiðingarprís, Føroyar 2018-2019

| | 2018[a] | 2019[a] |
|---|---|---|
| Makrelprísur | 7,89 | 8,55 |
| Makrelkvotaprísur | 5,26 | 6,62 |
| Prosent | 67 % | 77 % |
| Sildaprísur | 4,02 | 4,23 |
| Sildakvotaprísur | 2,23 | 2,35 |
| Prosent | 56 % | 56 % |
| Svartkjaftaprísur | 1,74 | 2,02 |
| Svartkjaftakvotaprísur | 0,45 | 0,41 |
| Prosent | 26 % | 20 % |

[a] Eftir uppgerðum hjá Fiskimálaráðnum (https://www.fisk.fo/fo/kunning/tidindi) og Vørn (https://vorn.cdn.fo/media/2919). Útrokningin er høvundans.

# Myndir




Mynd A.1: At broytingar í roynveruligu almennu útreiðslunum og broytingar í løntakaratalinum í privatari vinnu eru positivt korreleraði, bendir á viðrekandi fíggjarpolitikk.